# Hava kanska funnið barnaheimið hjá Jesusi

**Fornminnisfrøðingar í Ísrael hava nú - í sjálvari jólavikuni - helst funnið restirnar av einum húsum frá tíðini, tá Jesus gekk her á jørð. Fleiri kristin fólk halda, at hetta er húsið har Jesus vaks upp saman við móður síni, Mariu Moy**

FORNFRØÐI
*Snorri Brend*
*snorri¨sosialurin.fo*



*Á fyrsta sinni hava ísraelskir fornfrøðingar funnið leivdirnar av einum húsum í Nasaret frá tíðini, tá Jesus livdi og vaks upp í býnum*

**Nasaret, Ísrael:** Henda nýggja avdúkingin vísir, hvussu fólk livdu fyri 2000 árum síðani, um tað mundið tá Jesus livdi, sigur felagsskapurin Israel Antiquities Authority.

Mong halda, at Maria Moy livdi saman við Jesusi í eini holu, har sum snotuliga Føðingarkirkjan í Nasaret stendur ídag.

Men nú verður kanska ivi sáddur um tað veruliga var so, at Jesus búði í eini holu:

Við hesi seinastu útgravingini hava teir m.a. grivið fram tveir veggir í einum húsum. Í húsunum vóru tvey rúm og eitt tún, í hesum býnum har Jesus vaks upp, saman við eini 50 øðrum familjum.

- Út frá leir- og kritbrotum á staðnum, er líkt til at ein vanlig jødisk familja hevur húsast her, sigur fornfrøðingurin Yardenna Alexandre við Chicago Tribune.

### Vanlig hús

Fyri 2000 árum síðani var ikki óvanligt, at jødarnir í nánd av Nasaret krógvaðu seg í holum nærhendis í tíðarbilum, av ótta fyri rómverska hersetingarvaldinum.

Men hesin lítli landsbýurin var so mikið langt burturi frá alfaravegi, at tey høvdu ikki fyri neyðini at krógva seg.

- Henda uppdagingin er sera týdningarmikil, tí hetta er fyrstu ferð at vit hava funnið eini hús frá jødiska landsbýnum Nasaret.

- Hetta vóru helst eini vanlig hús í Nasaret um hetta mundið, sigur Yardenna Alexandre við fjølmiðlar.

Sambært henni var Nasaret, sum í dag er størsti arabiski býurin í Ísrael við 65.000 íbúgvum, ein lítil staður á Jesu døgum.

### Steinarnir tosa

Arbeiðsmenn komu fram á bústaðin seinasta summar, men tað var ikki fyrr enn í hesum mánaðinum at fornfrøðingar komu fram til, at hesin kundi vera frá Jesu døgum.

Ikki óvæntað fegnast tey lokalu kristnu um nýggju avdúkingarnar.

- Tað verður sagt, at um fólkið ikki tosar, so skulu steinarnir tosa, segði presturin Jack Karam í Føðingarkirkjuni í Nasaret.

Hinvegin ynskja fornfrøðingarnir ikki at knýta hesi húsini saman við barnaheiminum hjá Jesus.

## Um Nasaret í Bíbliuni

"Men tá ið Heródes var deyður, sí, tá sýndi eingil Harrans seg í dreymi fyri Jósefi í Egyptalandi og segði: »Statt upp og tak barnið og móður tess við tær og far til Ísraelslands; tí at teir eru deyðir, ið vildu taka barnið av lívi.« Og hann fór upp, tók barnið og móður tess og kom til Ísraelslands. Men tá ið hann hoyrdi, at Arkelaus var kongur í Júdeu eftir Heródes, faðir sín, óttaðist hann fyri at fara hagar; og hann fekk ávaring frá Guði í dreymi og fór avstað til Galileubygdirnar. Og hann kom hagar og búsettist í eini bygd, ið eitur Nasaret, at tað skuldi ganga út, ið talað var av profetunum, at hann skuldi kallast Nasareari".

*(Mattheus, 2. kapitul ørindi 19 til 23)*

## Grønlandstíðindi — Kári við Stein

# Kuldi og ísur komin í Grønlandi

**Vit hava frætt frá Kára við Stein. Nú er kalt í Grønlandi men nógvar rækjur**

**30. november**
Í morgun eru – 18 stig og stilli. Manu kom til Nuuk at landa í morgun. Tað er svartkalvi, sum teir hava inni.

**1. desember**
Tað er aftur -18 stig og stilli. Qaqqatsiaq kom í kvøld at landa. Teir hava gott og væl 410 tons inni. Frætt er frá Akamalik. Teir eru norðuri á 72,30 stigum. Her er minni kuldi -7 stig, men í gjár togaðu teir gjøgnum ís allan dagin. Ísurin kemur sníkjandi suðuryvir verður sagt.

Manu loysti aftur í kvøld nýggjan túr.

Frætt er frá toftamanninum William Hansen, sum førir Atlantic Enterprice. Teir hava roynt á økið 3 L og fingið 410 tons í 12 dagar. Nú vóru teir á økið 6. Teir loystu ikki posan, so lítið var í. Støðan er tann, at lítið og onki er til av rækjum sunnan fyri á økinum, men nokk er til á norðaru helvt. Steffen C er inni í Aassiat og millumlandar.

**2. desember**
Polar Qraasiut er inni í Aassiat og landar. Teir hava gott og væl 300 tons inni.

**3. desember**
Natarnaq kom inn í morgun at landa. Teir hava gott og væl 400 tons inni.

**7. desember**
Steffen C er í Nuuk og landar, og her í Sisimiut er Akamalik inni og landar. Hetta er ein stuttur túrur hjá teimum. Teir hava gott 370 tons inni.

**8. desember**
Polar Natoralik er inni í Nuuk og landar.

**9. desember**
Tveir risastórir trolarar eru inni her í morgun. Regina C hevur 560 tons at leggja upp, ein ófrøur túrur hjá teimum. Skipari er Jóhan Pauli Olsen. Markus, sum kom inn higar eftir tveimum trollemmum, hevur gott 600 tons, sum teir skulla landa í Nuuk í morgin. Ein roktúrur hjá Markus bæði í pengum og mongd. Teir vóru inni í Aasiat og millumlandaðu. Teir hava fiskað gott 1200 tons í ein mánaða. Skipari er Anfinn Laksafoss.

**11. desember**
Akamalik kom inn at skifta skipara og teir løgdu tað upp sum var umborð, teir loystu aftaná døgurða til nýggjan túr.

**14. desember**
Í dag er væl av vindi við lýggjum veðri, + 8 stig, og eitt sindur av sirmi. Ocean Prawns og Atlantic Enterprise hava báðir landað í Kanada. Ocean Tiger er á veg at landa í Harbour Grace. Teir verða inni í morgin seinnapart við fullari last. Teir hava bert brúkt eitt trol allan túrin. Har hevur verið nokk fyri alla tíðina verður sagt. Teinurin sum teir sigla á feltið eru um 565 fjórðingar.

Manu er komin inn til Nuuk at landa. Teir hava okkurt brek, sum teir skulla umvæla, áðrenn farið verður út aftur. Tað sama er við Polar Amaroq. Okkurt smáting skuldi gerast eisini meðan landað varð.

**15. desember**
Polar Qaasiut kom inn at landa í morgun. Teir skulla nokk liggja tvær nætur fyri at avríma lastina og fyri at seta tveir nýggjar plátufrystarar í skipið.

Søgur siga annars, at bátanir hava leitað eftir toski í Julianehåbsbuktini, men har var púra oyðið fyri fiski og tað sama var eystanfyri.

**18. desember**
Í dag er stilli + 6 stig, og hann lovar lýkku fleiri dagar fram, so tað kann vera, at vit fáa ikki hvít jól sum vit fingu í 1980. Sama nýggjárið druknaði alt í regni og stormi.

*Tykkum øllum sum lesa Sosialin vera ynskt eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár og takk fyri tað farna. Serliga takk til teir umborð á trolarunum, sum trúfastir hava hjálpt mær við at festar hesar reglur nú í fleiri ár.*

*Sisimiut 19. desember 2009*
***Kári við Stein***